# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum mongu, sum gleddu meg so nógv við vitjan, heilsum og góðynskjum á níti-ára degi mínum.



**Edith í Jákupsstovu**

## Tøkk

Eina hjartaliga tøkk til øll, sum komu at heilsa uppá meg til 80 ára føðingardagin harheima. Tøkk fyri kort, gávur og blómur. Tað var eitt stórt upplivilsi, at síggja familju og gamlar vinir einaferð aftur.

Túsund takk.

**Solveig (í Skorti) Lowe**

www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum



Redaktiónsleiðari

- Vilt tú mynda dagsskránna í Føroyum?

Á Sosialinum sóknast vit eftir einum redaktiónsleiðara, sum skal hjálpa blaðstjóranum í tilrættislegging og framleiðslu av tíðindapartinum av Sosialinum.

Sum redaktiónsleiðari verður tú við til at seta dagsskránna í føroyska tíðindaheiminum, har Sosialurin og Miðlahúsið í dag fevna um ein týðandi part av tíðindastreyminum, har vit gjøgnum fleiri miðlapallar eru við til at mynda føroyska samfelagið.

Vit sóknast eftir einum persóni við royndum innan yrkið, sum hevur gott yvirblikk, og sum eisini dugir at planleggja gerandisdagin - tó at nógvir óvæntaðir lutir altíð kunnu stinga seg upp á eini rokmiklari redaktión. Coaching og evaluering av blaðfólkum og arbeiði teirra er eisini týðandi partur av starvinum.

Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving ella royndir innan tíðindaheimin.

Eitt grafiskt eyga og evni at seta upp tíðindasíðurnar sjálv/ur er eisini ein fyrimunur, men tó eingin treyt.

Løn sambært avtalu.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, stjóra, ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra. Eisini ber til at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo ella eirikur@sosialurin.fo.

Áhugaðir umsøkjarar skulu **innan 20. august** senda umsókn og viðkomandi upplýsingar til:
Sosialurin
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Umsóknir kunnu sjálvandi eisini sendast við telduposti til jan@sosialurin.fo

*Sosialurin er ein fyritøka í støðugari menning. Hvønn gerandisdag eru vit á gøtuni við hópin av tíðindum. Blaðið er eisini at finna á alnetinum, har vit eisini røkja tíðindaflutningin á portal.fo, planet.fo og sportal.fo. Á Sosialinum starvast í dag um 25 starvsfólk.*

# Minningarorð um
# Solveig Kjelnæs

Tá eg flutti inn á Eirargarð minnist eg, at tú bleiv kontaktfólk hjá mær - vit fóru niðan í BR at keypa mær ein leikutoysshund, tí tað bar ikki til at hava ein livandi hund á Eirargarði.

Vit vóru í býnum og keyptu ymiskt, s.s knarvakot. So vóru vit í Keypsamtøkuni í Hoyvík og keyptu eina hvíta vetrarblusu at ganga í, tá kalt og kavi var.

Og tú og eg koyrdu niðan til Sonja Design at hyggja eftir pyamas og klæðum - vit keyptu tey og Sonja Design seymaði tey.

Tá tú var kontakfólk hjá mær, tá segði eg at, tú kundi verið mamma mín

Tá ið jólini vóru nánd, fóru vit øll á Hotel Hafnia at keypa okkum búff, dessert og reyðvín. Emma sang jólasangir og MC kom við ein kartong av eskjum við fløgum í og býtti tað út til búfólkið.

Onkuntíð gingu vit túrar við Janu og tá Jana ikki kundu fara at svimja, tá fóru vit báðar at svimja.

Tá eg fór til Frankaríki og Álands bað tú meg binda mær einar skóleistar at ganga í.

Tú hugsaði nógv um meg - vit báðar hyggaðu okkum við drekkamunn, tá tú skuldi hava náttarvakt, tá eg kom frá arbeiðið, settu vit okkum at fáa okkum ein bita av frokost og mariu keks.

Vit báðar vóru útferð við saman við Janu, Dudduni og Eydnu, vit hyggaðu okkum við bomm. Einaferð tá mamma hevði brotið bein, kom tú við oman við mær at vitja hana.

Tá eg vildi sleppa á bingo, tá segði tú, at eg skal bara keypa 5 plátur, drekkamunn og lutaseðlar, tí so spardi eg eitt sindur, um eg skuldi út at ferðast við frítíðarheiminum.

Einaferð fóru vit at vitja ein stovn, sum opnaði og vit fingu ein góðan drekkamunn og kakur úti í Marknagili.

Tú var í føðingardag tá eg fylti 40 ár á Hotel Føroyum og tú hjálpti mær at koyra kort í fartelefonina. Eisini hjálpti tú mær at koyra leidningin í stereoanleggið og tú gav mær eina skógvar sum vóru blivnir ov lítlir hjá tær.

Og tá eg ikki hevði tað so gott, bað tú meg fara oman í Hornabø at keypa kamillute, tú gav mær eina panodil og bað meg eta frukt og ikki slikk.

Einaferð tá telefonin ringdi og tú tók telefonina, tá var tað mostir mín. Tú komst inn á kamarið hjá mær og gav mær boðini, at mostur mín kom suður til Havnar við mammu mínari á hospitalið - mamma var lamin og kundi ikki tosa.

Tú segði við meg, at um eg vildi oman á Landssjúkrahúsið at vitja mammu, so kundi tú ella onkur annar koma við mær Eg vildi oman at vitja mammu og hava teg at koma við.

Tá eg gav urtapottinum vatn, bað tú meg geva Janu´sa eisini og tað gav eg. Tú bað meg koyra rullistólin hjá Janu út í gongina ímeðan vit fóru at eta nátturða og døgurða. Tú bað meg leggja klæðir saman fyri tykkum, tømdi uppvaskimaskinuna, og eg gjørdi alt sum eg var biðin um.

Tú hevði einiaferð gjørt vafludeiggj, og spurdi meg um eg dugdi at baka vaflur? Eg segði ja, so spurdi tú meg eisini um eg hevði hug at baka tær, og tað hevði eg. Tá segði tú: "Hvat skuldi vit gjørt uttan Emmu"

Tá tit ordnaðu búfólkum og tú kom inn í køkina og sá at náttverðin var klárur segði tú: "uttan Emmu hevði staðið illa til".

Tá Heri giftist var eg boðin við í brúdleyp, vit fingu fínan døgurða og fína dessert. Eg hevði eina so fitta talu og sang ein stuttan sang.

Heri arbeiðir á frítíðarheiminum og vóru vit í Tennerifa, Italien og Rom.

Eg skrivaði jólakort til hundarnar frá Emmu, tá fekk Eddie eitt jólakort frá Emmu, og tá segði tú við meg: "Eddie var so glaður fyri jólakortið sum eg hevði skrivað".

Tá sunnudagur var, so høvdu vit hamburgara til døgurða og tað dámdi tær væl. Tá eg ikki hevði tað gott, so segði tú við Rósu, hundin hjá mær, at mamma má slappa av.

Tú hevur verið nógv saman við okkum - tú var í Nesvík og tú var við á Zarepta. Seinastu ferð vit vóru á legu var tú so ússalig. Vit gingu túrar heim til klædnaforrætningina og mátti tú seta teg niður at hvíla. Tá vit komu heimaftur á Eirargarð frá Zarepta, kom tú til arbeiðis, tú orkaði ikki at verða til.

Tú fórt á sjúkrahúsið og skuldi niður á ríkissjúkrahúsið - tú kom uppaftur og var á hvíldarheiminum og fór heim til Joan, Monrad, Eddi og Hera.

Nú lá tú aftur á hospitalinum og tú hevði ongan lyst at eta. Eg og Dinna vóru á landsjúkrahúsinum og vitjaðu teg - tú segði við meg: "hey Emma"

Fríggjakvøldið ringdi Joan til Eirargarð at bera boðini, at nú var Sólveig Kjelnæs slóknað. Solveig var góð við okkum øll og vit takka henni fyri alt.

**Heilsan Emma**

## Dagurin í morgin

**10. august. Laurentius.** Lavrasmessa. Lurentius var ein av teimum best kendu halgimonnum í Norðurlondum. Hann var prestur og skatmeistari hjá pávanum Sixtusi II. Í árunum 258 varð hann tikin og illa píndur; m.a. verður sagt frá, at hann varð stoktur á eini rist og skuldi rópa, áðrenn hann andaðist: »Nú er stokt hesumegin. Vendið nú steikini.«

Kend er eisini halgisøgna um, at hann við hjálp frá trøllinum Finn eftir einari nátt bygdi dómkirkjuna í Lund. Hjálparmaðurin hevði kravt í løn sól og mána og Lavrasar eygu blá, men hann gitt navnið á trøllinum og fekk vald á tí. Í einari føroyskari vísu um hesa halgisøgu verður m.a. sungið:
Grát ikki, grát ikki, lítil kind,
í morgin kemur faðir tín Finn
bæði við sól og mána
og eygunum á Lavras í Lund

Navnið er latín og merkir hin lavrberjakrýndi.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Andrea Magnussen**, Søldafjørður, andaðist á Eysturoyar røktar- og ellisheimið 6. august, 86 ára gomul. Kistan fer av røktarheiminum í Runavík mikudagin, 9. august kl. 17.00. Jarðarfeðin verður úr Glyvrar kirkju hósdagin kl. 13.00. Tey, ið vilja minnast Andreu, kunnu lata Bønhúsinum í Søldafirði eina gávu.

**Poul Toftum,** Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum 7. august, 78 ára gomul. Jarðarfeðin verður úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 15.00. Sungið verður úr Sálmabókini.